# Útbúgving og globalisering

**Bertil Haarder legði fyri á Ráðstevnuni um miðnámsútbúgvingar**

ÙTÚGVING
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin*

Fríggjamorgunin setti Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, ráðstevnuna um gymnasialar miðnámsútbúgvingar. Á skránni vóru gestir úr fleiri norðurlondum, og høvuðsgestarøðari var danski undirvísingarmála-ráðharrin, Bertil Haarder. Fyrilesturin hjá Bertil Haarder bar heitið De Gymnasiale uddannelsen i Danmark set i globaliseringens lys (udfordringer og muligheder). Bertil Haarder legði fyri við at staðfesta, at munurin á vælferðarsamfeløgunum í norðurlondunum og Suður-evropa, USA og Asia, er, at her eru ongi størv til teirra, sum ikki fáa eina hægri útbúgving. Tí kunnu vit undir ongum umstøðum góðtaka, at fimti hvør næmingur, og umleið helmingurin av teimum tvímæltu, fara úr fólkaskúlanum við einum so vánaligum prógvi, at tað ikki gevur atgongd til eina miðnámsútbúgving.

Tí hava donsku skúlamyndugleikarnar sett sær fyri at bøta um útbúgvingarverkið sum heild, segði hann og kom við fleiri dømum.

Í fyrsta lagi at styrkja fólkaskúlan, við at stimbra næmingarnar málsliga longu í forskúlanum, og at geva fleri tímar í donskum fyrstu skúlaárini. Harumframt er neyðugt við fleiri sokallaðum testum og eftirmetingum.

Eisini tosaði Bertil Haarder um at broyta og styrkja læraraútbúgvingina. Á miðnámsskúlastøði prátaði Bertil Haarder nógv um at samstarva og samvinna millum gymnasialu útbúgingarnar og vinnuútbúgvingarnar, har ymsu greinarnar kunnu brúka hvørja aðra, so sum fak, lærarar og høli. Hetta skuldi givið eitt sterkari fakligt umhvørvi, umframt fleiri valmøguleikar til næmingarnar.

Annað sum hann vísti á var, at í Danmark hava tey júst samtykt, at stovna meistaralæru aftur, so ung fólk kunnu byrja eina vinnu- ella tekniska útbúgving við at fara i starvsvenjing og síðani í skúla. Ráðstevnan í Norðurlandahúsinum er allan fríggjadagin og nógv fólk er samankomið úr undirvísingarverkinum og úr politiska umhvørvinum.



*Bertil Haarder og Jóannes Eidesgaard*

# Legg av at roykja við Ùtvarpinum

**Fyribyrgingarráðið fer nú í gongd við skeiðið »Farvæl Tubbak Live«. Hvønn mánamorgun í 10 vikur verður ein sending í Útvarpinum, har tey áhugaðu fáa ráð og vegleiðing frá Mariu Olsen, roykavvvenjari**

HEILSA
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

– Vit vilja ikki koma við nøkum peikipinnum, uttan vit vilja geva fólki amboð, og so vita tey sjálvi hvat tey skullu gera.

Skeiðið vendir sær til vaksnar roykjarar og verður sent kl 8.45 hvønn mánamorgun í Ùtvarp Føroya. Ein mappa við tilfari er eisini tøk til tey sum velja at luttaka.

– Fyrstu tvær sendingarnar skal man ikki leggja av at roykja, tá skulu vit koma fram til, hvat fyri slag av roykjari man er og hvussu avvenjingin skal fara fram. Ikki fyrren 12 mars, Grækarismessudag, verður lagt av, sigur Maria Olsen.

Hon hevur arbeitt sum roykavvenjari í seks ár og hevur havt stóra framgongd. Við henni verða eisini onnur serkøn, sum kenna til teir ymisku trupulleikarnar, íð stinga seg upp, hjá fólki sum roynir at leggja av.

**Nógv roykja**

Føroyar er eitt tað Norðanlandið, har fólk roykja mest. Hóast tølini er lækkandi, so eru tað enn 27 prosent sum roykja dagliga.

– Vit vita ikki, hví tað er so, men í hesum førum eru Føroyar ein eftirbátur, sigur Pál Weihe, formaður í Fyribyrgingarráðnum. Han meinar, at tað er sosialt góðtikið at roykja í Føroyum og kann tað verða ein orsøk til, at tølini so høg.

– Um fimm ár vilja vit gjarna verða komin niður á svenskt støði, sum 2001 var 19 prosent.

**Hvussu og hvar**

Við hesum skeiði verður ein nýggjur miðil royndur at náa tey, íð vilja gevast at roykja. Nógv hevur verið gjørt burur úr roykavvenjing á ymiskum heimasíðum í síðstuni, og verður tí eisini gjørligt at fylgja skeiðinum á heimasíðuni hjá Fyribyrgingarráðnum www.fyribyrg.fo.

I tilfarinum sum fylgjur við skeiðnum verður nógv spurt um, hvussu og hvar tú roykir. Eisni er nógv jalig skjøl um, hvussu gott kroppurin hevur tað eftir at tú hevur sløkt seinastu sigarettina.

Tey, íð er áhugaði kunnu venda sær til Fyribyrgingarráðið á telefon 315155 ella www.fyribyrg.fo



*Fyribyrgingarráðið fer nú í ferð við eitt roykavvenjingsskeið sum verður sent í Ùtvarpinum*

## FAKTA

Aftan á at tú hevur sløkt sigarettina seinastu ferð
Minni enn 30 minuttir – gerst pulsurin regluligur – gerst blóðtrystið meira regluligt – gerst hitin í hondum og fótum aftur regluligur
Aftaná 24 tímar – minkar vandin fyri hjartatilburði
Aftaná 48 tímar – Batna smakk– og luktsansirnir
Aftaná 2 vikur til 2 mánaðir – Økist lungnaorkan upp til 30% – Batnar blóðreinslið – Verður tað lættari at ganga
Aftaná 5 ár – Vandin fyri deyða at lungnakrabba minkar umleið 50% hjá teimum, íð fyrr roytku umleið ein sigarettpakka um dagin

## FAKTA

Tey íð roykja dagliga frá 2002 til 2005 í Føroyum

| | |
|---|---|
| 2002 | 37% |
| 2003 | 36% |
| 2004 | 29% |
| 2005 | 27% |

## P/F Skálafjarðatunnilin er nú stovnaður

**Felagið, sum skal gera tunnilin millum Skálafjørðin og Havnina er nú stovnað. Forprojektið verður væntandi liðugt í summar, og tá fer felagið at søkja um endaligt loyvi at fara undir tunnilsætlanina**

TUNNIL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F og Føroya Lívstrygging hava stovnað P/F Skálafjarðartunnilin. Felagið varð stovnað hóskvøldið 16. februar 2006.

Endamálið við felagnum er at gera neyðugu forkanningarnar og forprojektið til undirsjóvartunnil mill-um Skálafjørðin og Havnina og tvørtur um Skálafjørðin, soleiðis at felagið kann søkja um endaligt loyvi at fara undir verkætlanina. Forkanningar og forprojekt verða gjørd í tøttum samskifti við Landsverk og Vinnumálaráðið.

Kaupthing Virðisbrævameklara-felag P/F og Føroya Lívstrygging eiga hvør sína helvt í P/F Skálafjarðartunlinum.

Í nevndina eru vald: Bergur í Garði, nevndarformaður í P/F Norðoyatunlinum, Malena Thomsen, borgarstjóri í Sjóvar Kommunu, Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar Kommunu, Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost, Martin Heinesen, jarðfrøðingur og Ingi Højgaard, sakførari, sum samstundis er valdur til nevndarformann.

Kristian Petersen, stjóri í Notio, er settur sum fyribils stjóri í P/F Skálafjarðartunlinum. Tá ið felagið hevur fingið loyvi til at fara undir sjálva verkætlanina, verður farið at leita eftir einum stjóra við røttu tekniskum førleikunum.

P/F Skálafjarðartunnilin fer í næstum undir jarðfrøðiligar kanningar, sum verða gjørdar í samráð við Vinnumálaráðið.

Væntandi verður eitt forprojekt liðugt komandi summar, og tá fer felagið at søkja um endaligt loyvi til at fara undir sjálva tunnilsverkætlanina.

P/F Skálafjarðar-tunnilin er grundaður á eina avtalu, sum Kaupthing Virðisbrævameklarafelag P/F hevur gjørt við Sjóvar, Nes og Runavíkar kommunur umframt við arbeiðsbólkin, sum hevur staðið fyri teimum flestu innleiðandi fyrireikingunum higartil. Hesir partar fara eisini frameftir at luttaka aktivt í arbeiðinum.